## Aftur smolt á Sandavági

Í summar hevur eingin laksur verið í aliringunum hjá partafelagnum Luna á Sandavági, men í vikuni hava teir sett smolt út í ringarnar, skrivar joanisnielsen.fo. Smoltið, sum vigar umleið 100 gram í meðal, er av smoltstøðini, sum Luna hevur á Fútakletti. Felagið hevur eisini aling á Sørvágsfirði. Har hava teir tikið laks síðani í summar, og laksurin er slaktaður á sláturvirkinum, sum Luna hevur í Sørvági. Luna hevur eisini aling á Gøtuvík.



*Nú er aftur lív í ringunum á Sandavági (Mynd: Jóanis Nielsen)*

## Sildarok

Teir seinastu dagarnar hava nótaskip fiskað sild við Vestmannaoyggjarnar, men í gjár frættist, at nógv sild var at fáa vesturi á Grundarfirði. Tvey skip fingu 1.000 tons í part í tveimum køstum, og tað vísti seg eisini, at hendan sildin var heldur størri enn tann, sum skipini fingu við Oyggjarnar. Hetta er ikki fyrstu ferð, at sild er á Grundarfirði. Tað sama hendi í januar í fjør, men tá fór sildin við øllum súrevninum, so alitoskurin á fjørðinum doyði.

# tunlinum



*- Her hendir nógv, men vandi er at menningin steðgar her í kommununi, tí tunlarnir eru so vánaligir, sigur Júst Poulsen, borgarstjóri í Hvannasunds kommunu*

*Mynd: Høgni Thomsen*

ult at fáa vøkstur í hetta økið í framtíðini, sigur hann.

Tá kann tað gera tað sama, um ein bæði hevur handil, væl útbygdan skúla, barnagarð og tøk grundøkir. Samferðslan er av allar størsta týdningi fyri fólkið!

### Fólkatalið í minking

Fyri at veita borgarunum tær tænasturnar, sum nútíðin krevur, hevur kommunan sett sær fyri at tryggja teimum tey bestu korini sum nútíðin krevur.

Eitt av hesum málum er at fólk kunnu fáa møguleikan at búseta seg í kommununi, soleiðis at fólkatalið aftur kann menna seg.

Sambært einum yvirliti frá Hagstovuni hevur talið verið rættiliga skiftandi tey seinastu 20 árini – kanska í heldur lægra endanum beint í løtuni.

Fyri 20 árum síðani búðu 459 fólk í teimum fimm bygdunum í Hvannasunds kommunu, meðan talið í dag er nakað lægri, 431.

Hetta hevur kortini ikki hildið bygdaráðnum aftur, í at gera sítt til at fólk kunnu búseta seg. Eitt av hesum støðum er í Norðdepli, beint við skúlan á Fossánesi.

- Her verður í fyrstu syftu gjørt pláss fyri fýra grundøkjum, sigur Júst við Sosialin.

### Fyrispurningar um øki

Tað eru kortini ikki øll, ið bert eru áhugað at byggja í Norðdepli. Fleiri hava somuleiðis áhuga í at búseta seg hinumegin sundið.

Í Hvannasundi eru eisini øki, sum kommunan eigur og sum eru væl hóskandi til sethús. Her kann kommunan eisini veita øki til tey byggihugaðu.

Kommunan fær við ávísum millumbilum fyrispurningar frá fólki úr økinum, og sum ætla at búseta seg her. Men tað er ikki altíð at tað verður til veruleika.

- Tað vísir seg tíverri ofta, at tá tað kemur til at fara undir bygging, eru fólk ikki eins seriøs, slær borgarstjórin fast.

Hann hevur eisini sína frágreiðing um, hví tað er so: Vánaliga ferðasambandið til Klaksvíkar.

### Alt steðgar upp

Skulu fólk úr Hvannasundi til Klaksvíkar, er neyðugt hjá teimum at koyra gjøgnum teir báðar tunlarnar á Borðoynni.

Teir vórðu gjørdir í eini tíð, tá lítil ferðsla var – og serstakliga lítið av teirri tungu ferðsluni hesi árini miðskeiðis í 60'unum.

Í dag er munandi øðrvísi, og í dag eru hesir báðir tunlarnir ein stór og beinleiðis forðing fyri menning í økinum norðanfyri, tað er: í Hvannasunds og Viðareiðis kommunum.

- Ja, eg má bara siga sum tað er, at stórur vandi er fyri at alt steðgar upp her norðanfyri orsakað av tunnilssambandinum, sigur Júst.

Hann leggur dent á, at tey fingu lovað at í 2008 skuldi peningur verða settur av til nýggjan tunnil. Men tá hann hevur hugt uppskotið til fíggjarlóg ígjøgnum, sæst einki til nakra slíka játtan.

- Hetta eru vit sera vónbrotin av!

> *Vit hava kanska ikki rópt ov nógv upp um tunlar. Eg trúgvi tó at myndugleikarnir kenna okkara umstøður*
> *(Júst Poulsen, borgarstjóri)*

> *Stórur vandi er fyri at alt steðgar upp her norðanfyri orsakað av tunnilssambandinum*
> *(Júst Poulsen, borgarstjóri)*

## Fólkatal í Hvannasunds kommunu

Hvannasunds kommuna fevnir um tær fimm bygdirnar: Hvannasund, Norðdepil, Depil, Norðtoftir og Múli.

Í summar búðu 431 fólk í kommununi, men annars hevur fólkatalið við ársbyrjan verið hetta:

1985: 459
1990: 492
1995: 457
2000: 441
2005: 449

Størsta bygdin er Hvannasund við 255, meðan Norðdepil hevur 166 íbúgvar.

Fimm eru skrásett á Norðtoftum, trý í Múla og tvey í Depli.

## Kristiliga Sangkórið byrjar aftur

**Havn:** Eftir ein steðg er nú klárt hjá Kristiliga Sangkórinum at byrja venjingar sínar aftur.

Kórleiðarin, Hanus Joensen er til reiðar til fyrstu venjingina í KFUM, har kórlimirnir møta hvørt týskvøld frá kl. 19:30 og tveir tímar fram.

Hesa komandi tíðina og fram til jóla verður jóladámur yvir venjingarnar, tí bæði jólaløg og jólasangir skulu venjast fram móti stóru høgtíðini.

Talan verður um jólaløg uttan úr heimi, men eisini um løg og tekstir við føroyskum uppruna.

sb.

## Lítil veiða men góður prísur

Fríggjadagin í farnu viku fingu snellubátarnir í Sandoy nakað av fiski. Teir lógu úr 300 upp í 700 pund.

Nakrar av bátunum fara við bili inn á Toftir við veiðuni, skrivar heimasíðan bkv.fo.

Sagt verður, at dagarnir hjá hesum útróðrarmonnunum kunnu verða langir. Teir leggja frá landi til útróðrar árla á morgni, og verða aftur um hálvgum seks-tíðina, og fara síðani á Toftir við veiðuni.

- Teir eru mangan ikki aftur við á Sandi fyrrenn tað líður til midnátt, verður sagt.



*Útróðrarmenn í Sandoy fáa góðan prís fyri veiðuna*

*(savnsmynd)*